




## Besta songkvinna:

# Bara eg og mín rødd...

Tað var ein týðiliga rørd Lena Andersen, sum tók ímóti virðislønini fyri at gerast besta songkvinna.

- Hetta hevur ótrúliga nógv at siga fyri meg. Tað er altíð gott at fáa viðurkenning, fyri tað arbeiði man hevur gjørt.

Lena vann eisini eina Planet í fjør. Tá vann hon fyri bestu útgávu. Men hon heldur tað vera ringt at samanbera hesar báðar prísirnar.

- Tað er ringt at siga, at man er glaðari fyri eina av teimum. Men um eg skal velja, so kann eg siga, at á eini fløgu eru nógv fólk, sum arbeiða við at gera hana góða. Og tey eiga øll lut í heiðurslønini. Tá eg nú havi vunnið sum besta songkvinna, so er tað bara eg einsamøll og mín rødd, sum verður vigað og mett um. So tí hevur hetta ótrúliga nógv at siga fyri meg, staðfestir Lena.

- Man hoyrir altíð at Føroyar eru so lítlar, men her hendir ein rúgva, so vit mugu ansa eftir ikki at undirvurdera okkara egna land. So hóast eg royni at satsa uttanlands, so vil eg eisini altíð geva alt her heima.

Og vit kunnu gleða okkum, tí Lena segði eisini, at tað er nógv tilfar sum liggur og bíðar nú, og at hon tí væntandi fer undir eina nýggja fløgu skjótt.



## Besti bólkur ella einstaklingur:

# Mammurnar umboða Dreymarnar

Tá tað varð kunngjørt, at The Dreams vórðu ársins bólkur, vóru tað ikki harðir punkarar, ið trinu á pallin. Teir vóru nevniliga staddir á Tvøroyri, har teir skuldu spæla konsert. Ístaðin høvdu teir fýra sent mammurnar at taka ímóti Planet heiðurslønini.

Forsangarin Hans Edward Andreasen var tó við í telefonini, og hann var fegin um heiðurin. – Hetta er ordiliga feitt. Tað er kul at vera best í Føroyum, og tað er serliga kul, tí tað er fólkið í Føroyum, sum hevur stemmað uppá okkum.

Hann var eisini fegin um árið um heild. – Í ár er alt kickstartað hjá okkum, og nú eru vit ordiliga komnir í gongd. Men sjálvt um tað hevur verið gott í ár, so verður tað enn betri næsta ár. Alt tað besta er eftir enn, segði ein glaður og vónríkur Hans Edward Andreasen.

Mammurnar Edith, Malan og Súsanna vóru ikki minni fegnar.

- Vit eru øgiliga stoltar. Í fleiri ár hava vit nú lagt oyru og tol til, men nú hava vit fingið alt aftur í ríkiligt mát.

Og mammurnar fylgja væl við synunum í Danmark. Hvønn fríggjdag er Boogie listin á skránni, tí tær vilja vita hvat nummar The Dreams eru.

- Teir eru seriøsir og teir arbeiða hart, og tí vænti eg, at teir fara at koma langt, sigur Súsanna.

Malan skoytir uppí og sigur, at teir trúgva uppá tað, brenna fyri tí og so elska teir tónleikin. Og mammurnar teljast eisini ímillum størstu fjeppararnar.

Tær eru samdar um, at The Dreams spæla tónleik fyri øll, tí teir hava so melodiøs løg. Og – eins og meirilutin av sms-atkvøðarunum- dámar teimum avbera væl teirra tónleikin.